# MASKINMEISTARIN

Nr. 12 / Desember 2020




## Koyrandi landstreymur í Havn



## Koronumerktur aðalfundur



## Frá dampmaskinu til nútímans motorar



## Minningarorð um Eydnu

**Útgevari**
Maskinmeistarafelagið.
Blaðið verður sent limunum.
Vanliga eru fýra útgávur um árið.

**Blaðnevnd**
Ólavur Gunnarsson, ábyrgd
Regin Olsen

**Maskinmeistarafelagið**
Grønlandsvegur 58
Postboks 3238
110 Tórshavn
Tel 31 47 18
Teldupostur: mf@mf.fo

**Blaðhald**
Tey, sum ynskja at halda Maskinmeistaran, kunnu boða frá hesum í telduposti til: press@press.fo
Haldaragjaldið er 200,– kr. um árið;

**Endurgeving**
Endurgeving bert loyvd samsvarandi lógini um upphavsrætt. MASKINMEISTARIN kann takast niður sum pdf á heimasíðuni hjá felagnum, www.mf.fo

**Forsíðumyndir**
Landstreymur, Øssur Winthereig
Aðalfundur, Ingolf S. Olsen
Dallin, Grækaris Djurhuus Magnussen
Minningarorð, privatmynd

**Umsiting og redaksjón**
Press: press@press.fo
Øssur Winthereig
ossur@press.fo
Tel 21 84 86
Ingolf S. Olsen
ingolf@press.fo
Tel 22 50 77
Grækaris Djurhuus Magnussen
grakaris@press.fo
Tel 51 44 44

**Umbróting**
Grafikmaster
www.grafikmaster.fo
502022

**Prent og liðugtgerð**
Control P
controlp@controlp.fo
357774

Upplag: 800

# INNIHALD

Sjófólk fyri vanbýti .......... **3**
Koronumerktur aðalfundur .......... **4**
Koyrandi landstreymur í Havn .......... **10**
Frá dampmaskinu til nútímans motorar .......... **14**
Til minnis um Eydnu Bernhardson .......... **23**
18 nýggir maskinmeistarar .......... **23**
Allir sáttmálarnir komu undir land .......... **24**
Føðingardagar .......... **25**
Tíðindi .......... **26**

# Sjófólk fyri vanbýti

Vit hava ymiskar almennar skipanir, sum eru ætlaðar at lofta fólki fíggjarliga, tá ið teppið brádliga verður skrætt undan teimum.

Ein av hesum er Arbeiðisloysisskipanin, ALS. Øll, sum eru fevnd av skipanini, kunnu fáa úr henni, um tað ber so á, at ein missir arbeiðið.

Ein treyt fyri at kunna fáa úr skipanini er, at viðkomandi hevur fingið eina uppsøgn.

Manning á fiskiskipum verður sjáldan søgd upp, og tí hava tær trupult við at fáa atgongd til skipanina. Vit hava dømi um, at skip hava ligið óvirkin í meira enn eitt ár, uttan at manningin tó hevur fingið uppsøgn.

Ein serskipan er, tá ið skip eru til umvælingar. Men tá má manningin bíða í 30 dagar – vanliga rópt karensdagar ella revsingardagar – áðrenn hon hevur rætt til nakað, og síðani er rætturin til útgjald galdandi í 60 dagar. Tó er reglan, at útgjaldið minkar við einum hálvum prosentstigi fyri hvørjar 1.000 krónur, sum inntøkan árið fyri fór upp um 210.000 krónur. Roknistykkið merkir, at hevur tú havt eina inntøku árið fyri, sum er oman fyri 410.000 krónur, hevur tú ikki rætt til eitt oyra.

Her skal undirstrikast, at hendan reglan um prosentvísa minking eftir inntøku ikki er galdandi fyri nakran annan fakbólk, tá talan er um endurgjald fyri mista inntøku vegna umvælingar ella líknandi.

Her eiga vit at stremba eftir, at teir 30 karantenudagarnir verða strikaðir ella í hvussu er munandi minkaðir, og at mótrokningin verður strikað ella somuleiðis munandi minkað.

Tó at vit eru ein sjófartstjóð við lít, tykist tað vera reglan heldur enn undantakið, at sjófólk detta burtur



ímillum, tá serskipanir verða gjørdar vegna serligar umstøður.

Eitt nú í sambandi við koronufarsóttina, har sjófólk als ikki eru tikin við, tá ið politiska valdið hevur snikkað sínar sonevndu hjálparpakkar saman.

Vit hava sæð dømi um menn, sum sigla við skipum á fjarleiðum og hava mist heilar túrar orsakað av, at teir hava verið noyddir at vera í sóttarhaldi, tá ið skipið skuldi avstað. Og av tí, at hesi skip oftast hava tvær manningar, so eigur viðkomandi ikki við túrin eftir. Um illa vil til, kunnu sjófólk upp á henda mátan missa hálvar ársinntøkur, men ongin skipan er at lofta fólki, sum koma í hesa støðu.

Sama skil er við partrolarum, sum ikki eru slopnir út, tí at manning á skipinum, sum teir partrola við, er í sóttarhaldi. Heldur ikki her er nakar hjálparpakki snikkaður saman at hjálpa upp á støðuna.

Vit kunnu bara staðfesta, at sjófólk eru sera hent at hava, tá ið tað ræður um at fylla í hesar ymisku skipanirnar, men als ikki verða tiknir við í roknistykkið, tá tað ræður um at býta út aftur í hinum endanum.

Her má broyting koma í og tað ongantíð ov skjótt, soleiðis at hesar skipanir fara at venda rætt, og øll, sum gjalda inn, hava somu møguleikar at fáa útgjald.

2020 hevur verið eitt ár, sum heilt vist fer at fylla í søgubókunum. Tað hevur korona-farsóttin við øllum sínum fortreðiligheitum syrgt fyri. Virksemið hjá felagnum hevur eisini verið nógv merkt av farsóttini, somuleiðis útgávan av Maskinmeistaranum, men vit vóna, at 2021 verður eitt meira vanligt ár.

Við hesum fari eg vegna Maskinmeistarafelagið at ynskja øllum limum felagsins við familju eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.



***Ólavur Gunnarsson***
*formaður í Maskinmeistarafelagnum*

**Ólavur heldur fram**

Ólavur Gunnarsson hevur gjørt av at taka eitt tørn afturat sum formaður í Maskinmeistarafelagnum. Hesum boðaði hann frá beint fyri, at freistin fyri uppstilling til formansvalið var úti 15. desember. Ongin stillar upp ímóti sitandi formanni. Formansskeiðið er trý ár.

# Koronumerktur aðalfundur




**Aðalfundurin hjá Maskinmeistarafelagnum í ár var seinkaður í tveir mánaðir orsaka av koronu, og lítið hóvasták varð gjørt burturúr. John Højsted og Jóhan Mørkøre blivu afturvaldir í nevndina**

**Tekstur og myndir:**
Ingolf S. Olsen – PRESS

Korona merkti aðalfundin hjá Maskinmeistarafelagnum í ár. Fyrst mátti hann útsetast í tveir mánaðir, og tá hann varð hildin í Smæruni hjá Starvsmannafelagnum 23. mai, var tað uttan nakað hóvasták av nøkrum slag. Eftir ætlan skuldi onkur gestarøðari vera við í ár, men tann ætlanin bleiv slept, og somuleiðis sosiala samveran afturvið einum betri bita, sum plagar at vera aftaná fundin.

Aðalfundurin var avmarkaður til tað reint formliga samsvarandi dagsskránni, ið er ásett í viðtøkum felagsins.

Í innganginum til sína formansfrágreiðing harmaðist Ólavur Gunnarsson støðuna, men vónaði, at tað fór at vera frægari umstøður til at gera okkurt serligt burtur úr aðalfundinum næsta ár, tí tá fyllir Maskinmeistarafelagið 80 ár.



*Í síni formansfrágreiðing vísti Ólavur Gunnarsson millum annað á, at ábendingar eru um, at áhugin at útbúgva seg innan maritimu fakini generelt er dalandi, men at tað tó ikki sær so galið út við áhuganum fyri maskinmeistaraútbúgvingini*

Her verða endurgivin nøkur redigerað brot úr formansfráðgreiðingini – brotini um sáttmálasamráðingarnar eru tó løgd burtur ímillum, tí allir sáttmálarnir eru fingnir til høldar síðani aðalfundin, og greitt er frá teimum í aðrari grein:

**Farsótt og samráðingar**
Vísandi til koronasmittuna, so hava vit ikki ábendingar um at tað eru limir hjá okkum sum hava merkt nakað stórvegis til íkomnu støðuna. Treyðugt so, so eru tað nógvir av limunum, sum eru raktir av støðuni á tann hátt, at gerandisdagurin hjá teimum er broyttur, eitt nú við øðrvísi vaktargongu, longri útmynstringar ella steðgir heima og sóttarhald. Men at nakar hevur mist starvið ella er heimsendur sum liður í hjálparpakkunum, eru vit í hvussu so er ikki gjørd varug við. Hettar er sjálvandi at gleðast um, og vísir hettar eisini á tann týdningarmikla leiklut, maskinmeistarar hava í samfelagnum.

Viðvíkjandi sáttmálasamráðingunum, so mugu vit bara ásanna, at søgan endurtekur seg. Enn einaferð eru vit endaðir í afturhond. Hesaferð fyrst vegna løgtingsval, sum bleiv hildið




*Soleiðis eru limirnir í Maskinmeistarafelagnum býttir á arbeiðspláss*

31. august í fjør, og seinni vegna hesa ólukku farsóttina. Hettar er við at blíva ein góðtikin óskikkur, og tað má veruliga setast á fyri at fáa hettar á beint aftur. Sjálvandi skilji eg væl, at tað er umráðandi, at Lønardeildin, sum hevur sáttmálar um hendi vegna Fíggjarmálaráðið, hevur eitt landsstýri at fyrihalda seg til, men eg haldi tó, at samráðingarnar hava gingið alt ov seint. Hettar ber brá av, at uppgávan at samráðast ikki verður tikin í tí álvara, hon eigur, og við hetta lag gongur tað langt út á árið, áðrenn allir sáttmálarnir eru komnir upp á pláss.

Eg lovaði at gera felagið meira sjónligt, og havi roynt eftir førimuni at liva upp til hettar bæði í skrift og talu, tá ið høvi býðst. Sjálvandi ikki bara fyri at verða har, men fyri at gera vart við ymiskt, sum rørist í okkara starvsøki. Hvussu hettar hevur roynst, eru tað uttan iva ymiskar meiningar um, men havi eg altíð roynt at vera objektivur og ópolitiskur í mínum útsøgnum.

**NMF**

Vit vóru vertir fyri fyrra fundinum hjá NMF, sum var dagarnar 8. og 9. apríl í fjør. Formelli parturin varð hildin á Hotel Hafnia, og so vóru vit og vitjaðu vindmyllulundina hjá SEV, har Terji Nielsen hevði eina sera áhugaverda framløgu. Um kvøldið vóru vit vertir við ein framúrskarandi døgurða í Stokkastovuni í Kirkjubø, har bóndin eisini hugleiddi um søguna hjá staðnum. Dagin eftir var útferð gjørd til Gásadals, har Green IQ hevði eina framsýning av teirra vatnútskiljara til maritimu vinnuna. Miðmáli var so í Gásadalsgarði, áðrenn útlendska ferðalagi legði leiðina heimaftur.

100 ára hald var í Keypmannahavn í



*Nevndarval á skránni, Sjúrður Heinesen, skrivari í Maskinmeistarafelagnum, savnar atkvøðurnar inn*




*Sjúrður Heinesen, vinstrumegin, skrásetir fundarluttakarar. Jógvan Elias Winther Poulsen, advokatur hjá Sókn Advokatum, høgrumegin, var nýggjur orðstýrari, nú Páll Nielsen, sum hevur verið advokatur felagsins í nógv harrans ár, er givin vegna aldur*



*John Højsted og Jóhan Mørkøre stóðu fyri vali hesaferð, og teir blivu báðir afturvaldir*

oktober. Haldið var hildið í samband við regluliga hálvárliga fundin.

Dagurin bleiv hildin við ymiskum innleggum í stásiligu hølunum hjá Danske Rederier. Vit høvdu bjóðað Hans Jóhannes á Brúgv, stjóra í Sjóvinnustýrinum, at hava eitt innlegg, og hann umrøddi talgildu mynstringarskipanina, sum er við at blíva implementerað her. Um kvøldið var so galladøgurði, har danska maskinmeistarafelagið var vertur. Samanumtikið ein sera væleydnaður dagur.

Dagin eftir var so tann meira formelli parturin hildin í hølunum hjá tí danska maskinmeistarafelagnum, áðrenn leiðin gekk heimaftur á klettarnar.

Tað skuldi havt verið fundur í Íslandi í apríl, men hesin fundurin bleiv avlýstur orsaka av Korona støðuni. Støða er tikin um at tað av hesi orsøk bert verður tann eini fundurin í ár, sum verður í Íslandi í oktober.

## FMU

FMU – Faroese Maritime Unions – er felagið, sum vit settu á stovn saman við hinum manningarfeløgunum fyri at umboða útlendsk sjófólk í FAS. Felagið hevur ikki verið serliga virkið síðani stovnan, og soleiðis hevur tað eisini verið í 2019. Tó hava vit ígjøgnum hetta felagið roynt at fáa loyst eitt nú trupulleikan við manglandi dekkarum í føroyska partinum av FAS-flotanum við at fáa gjørt ITF-sáttmálar fyri hendan starvsbólk, men hevur hettar verið úrslitaleyst, mest orsaka av, at tað eina felagið, sum umboðar hendan starvsbólk, ikki hevur vilja viðvirkað. Hettar hevur so ført við sær, at okkurt reiðarí hevur sæð seg noytt at fáa sett hesar dekkararnar ígjøgnum sáttmálar við íslendskt manningarfelag við viðmæli frá Føroysku feløgunum. Hettar er ein keðilig støða, tí vit vildu helst, at hettar var gjørt ígjøgnum manningarfeløgini her á landi.

Vónandi fer tað at eydnast at fáa FMU veruliga upp at koyra, soleiðis at tað livir upp til endamálsorðingina, sum er at umboða útlendsk sjófólk í Føroyum.

## Blaðútgávan

Vit avgjørdu á nevndarfundi beint eftir aðalfundin í fjør, at endurnýggja sáttmálan við Press um útgávu av Maskinmeistaranum fyri eitt ár.




*Nevndarlimirnir John Højsted, Jóhan Mørkøre, Regin Olsen, næstformaður, og Ólavur Gunnarsson, formaður. Fimti nevndarlimurin, Berit Hovsgarð, fekk ikki verið við á aðalfundinum hesa ferð*



*Aðalfundurin í ár var skerdur av koronu, men kortini var uppmøtingin heilt hampulig, og dúgliga bleiv spurt og kjakast*

Vit halda framvegis, at tað gevur meining at geva blaði út, tó er spurningurin, um leisturin møguliga kundi verið endurskoðaður. Hettar verður alt latið upp til nývaldu nevndina at viðgera, og so fáa vit at síggja, hvat spyrst burturúr.

## Ymisk luttøka

Vit luttóku á afturvendandi tiltakinum Sjóvinnuforum 9. mai í fjør. Sum heild var tiltakið væleydnað, og eini 60-70 fólk høvdu leitað sær á Vinnuháskúlan at lýða á framløgurnar. Teir, ið høvdu framløgurnar, vóru formenninir í manningarfeløgunum, stjórarnir í ávikavist Sjóvinnustýrinum og á Vinnuháskúlanum og Pál Weihe, arbeiðsmedisinari.

Maskinmeistarafelagið var eisini við á Atlantic Fair í Klaksvík dagarnar 21.-23. mai í fjør saman við Antares og Vinnuháskúlanum. Hóast básurin hjá okkum ikki var tann lættasti at finna, vóru tað ikki so fá, sum løgdu leiðina framvið til eitt prát. Eisini blivu fleiri avtalur um vitjanir fingnar í lag. Samanumtikið var talan um sera hugaliga og gagnliga luttøku. Stendur tað til mín, so verða vit ímillum luttakararnar, tá ið tiltakið verður aftur.

Vit vóru við sum fyriskiparar av einum rímiliga væl vitjaðum tiltaki í Smæruni um fiskivinnupolitikk. Tiltakið var skipað við einum innleggi frá hvørjum felag. Síðani hevði Eivind Jacobsen eina framløgu um støðuna hjá vinnuni, og so var endað við einum pallborðsorðaskifti, har Aksel V. Johannesen, Jacob Vestergaard og Høgni Hoydal luttóku. Høvi var hjá áhoyrarunum at seta spurningar, og vóru tað ikki sá fáir, sum nýttu hetta høvi.

Eisini havi eg verið á einari rundferð kring landið saman við eftirlønar- og tryggingarfelagnum LÍV fyri at varpa ljós á viðurskiftini hjá limunum, sum hava eftirløn og trygging har. Tiltøk vóru í Leirvík, Havn og í miðnámskúlanum í Hovi. Samanlagt vóru umleið 100 limir við í hesum tiltøkunum, har høvi eisini var at seta serfrøðingi spurningar. Samanumtikið var talan um bæði upplýsandi og gagnligar fundir.

Í samband við at Korona sóttin herjar, tóku ávís fakfeløg stig til at gera eitt sokallað kreppuráð. Vit avgjørdu sum tað einasta av manningarfeløgunum at vera við. Tó vildu vit ikki fara við sum umboðandi alt sjófólkið, tí vit høvdu fingið at vita frammanundan, at vit hvørki skuldu umboða navigatørar ella dekksfólk. Sostatt eru vit við vegna okkara egnu limir, sjálvandi eisini sæð í ljósinum av, at ein stórur partur av limaskarðanum hjá okkum er landbaseraður.

## Onnur tiltøk

Maskinmeistarafelagið stuðlaði flaggsiglingini, sum var í mai í fjør, og vóru vit so hepnir at verða bjóðaðir við Westward Ho seinasta teinin frá Helsingør til Norðuratlansbryggjuna í Keypmannahavn. Orsakað av at vit kortini vóru í Keypmannahavn í samráðingarørindum, gjørdu vit av at taka av. Við á túrinum vóru millum annað táverandi forsætisráðharrin Lars Løkke Rasmussen og konan Sólrun. Har var undirhildið og sungið allan túrin, har harmonikutónarnir og felagssangurin rungaðu. Fyrst undir

dekki, men sum vit nærkaðust, var farið upp á dekkið. Tá komið var á Norðuraltlansbryggjuna, var móttøka við røðum, undirhaldi og einum bita. Hetta var ein sera góður og minnisríkur túrur.

**Útbúgving av maskinmeistarum**
Tað er okkurt, sum bendir á, at áhugin at útbúgva seg innan maritimu fakini er dalandi. Kanska ikki so nógv á maskinsíðuni sum á tí nautisku. Tó eru tað útbúnir 28 maskinmeistarar tað seinasta árið. Prógvhandan var ávikavist 27. juni, tá 18 fingu prógv, og so aftur 24. januar í ár, tá ið 11 fingu prógvið handa.

Í verandi løtu (í mai, blðm.) eru tað 103 næmingar, sum lesa til maskinmeistara, harav seks aspirantar. Tað eru 14 næmingar í M6, sum skulu til endaliga próvtøku í næstum. Hvat maskinistum viðvíkur, so var áhugin so lítil í fjør, at eingin upptøka var. Í ár er støðan ein onnur, og eru longu 10 tilmeldaðir at byrja í august.

Eg havi umrøtt við Vinnuháskúlan, um vit ikki skulu gera eina herferð at promovera hetta framúr yrkið. Planurin er at gera eitt toymi mannað við formanninum í Maskinmeistarafelagnum, umboð fyri Vinnuháskúlan, onkrum næmingi á maskinmeistaraútbúgvingini og onkrum av okkara framúrskarandi maskinmeistarum, sum ætlandi skulu vitja framhaldsdeildirnar í fólkaskúlunum fyri at greiða frá yrkinum. Mín sannføring er, at hettar hevði verið bæði gott og gagnligt átak fyri at varpa ljós á hettar framúrskarandi yrki.

**Óheppin ætlan**
Vísandi til maskinmeistarayrkið og teir møguleikar, sum útbúgvingin gevur einum, so fingu vit eina lógarbroyting til hoyringar í vár. Broytingin hevði til endamáls at bera so í bandi, at tað fram eftir bert vóru stórar el-fyritøkur, sum kundu hava løggilding. Hettar hevði viðført, at talan bleiv um 10-20 løggildar fyritøkur, sum sostatt høvdu komið at sita á øllum marknaðinum.

Tað eru ikki so fáir maskinmeistarar, sum hava fingið sær eina avmarkaða løggilding, sum hevur verið til gagns bæði fyri teir sjálvar og ikki minst fyri vanliga brúkaran, sum soleiðis hevur havt lættari við at fáa ymiskar smáinstallasjónir gjørdar.

Maskinmeistarafelagið lat inn hoyringarskriv, har vit gjørdu okkara støðu greiða. Broytingin hevði eftir okkara tykki viðført, at virðið á maskinmeistaraútbúgvingini bleiv markant lækkað, og at møguleikarnir, sum hon gevur, eisini blivu skerdir tilsvarandi.

Hvussu var og ikki, so bleiv uppskotið tikið aftur, í hvussu so er fyribils. Hvat víðari hendir, og um tað kemur fram aftur, er ilt at siga, men um so er, so eru vit til reiðar at gera okkara støðu greiða einaferð enn.

Fyri ikki so langt síðani bleiv eg eisini kontaktaður av lærara á Vinnuháskúlanum, sum vildi hoyra mína meining um planirnar um at niðurlaga elpartin av útbúgvingini. Eg gjørdi honum greitt, at tað var í fullkomiligari andsøgn við allan logikk, tí trendurin er, at maskinmeistarafakið júst førkar seg meira og meira el- og automasjónsvegin. So tilmælið hjá mær var heldur at styrkja um hendan partin, soleiðis at útbúgvingin flytur seg sama veg, sum fakið sjálvt gerð.

**Skrivstovuarbeiðið**
Skrivstovuarbeiðið seinast ár var í stóran mun merkt av, at skrivstovukvinnan hjá okkum Eydna Bernhardson varð rakt av herviligari sjúku, sum bara stóð við og vesnaði. Soleiðis gjørdist gerandisdagurin hjá henni meira og meira merktur av hesum. Sigast skal, at hon var ófør og royndi alt hvat hon kundi at røkja arbeiðið so leingi, hon á nakran hátt kundi.

Í september bleiv Áshild Joensen sett fyribils at røkja hetta starvið, og í oktober bleiv hon so sett í fast starv 15 tímar um vikuna. Áshild er avbera dugnalig til sítt arbeiði, sum sýnist at fella henni sera lætt, og eru vit sera heppin at hava fingið hana í starv hjá okkum.

Í aðrar mátar hevur árið stórt sæð líkst øðrum árum. Tað hava verið nøkur persónsmál, okkurt av teimum hava vit fingið loyst í sátt og semju, onnur tykjast at verða meira trupul at loysa partanna millum, og hava vit tí eini trý mál úti hjá løgfrøðingi felagsins í løtuni. Vit hava framvegis vón um, at til ber at finna loysnir uttan um rættarskipanina, men um tað ikki ber til, so aftra vit okkum heldur ikki at fara tann vegin.

Løgfrøðingur felagsins tey seinastu nógvu árini, Páll Nielsen, hevur boðað frá, at hann gevst vegna aldur. Í hesum sambandi hevur felagið avgjørt at fáa Sókn Advokatar at veita løgfrøðiliga hjálp til felagið frameftir. Vit fara at takka Pálli fyri tíðina, og ynskja Sókn Advokatum vælkomnum við vón um gott og gevandi samstarv.

**Limatalið veksur**
Limatalið sýnist eisini at førka seg tann rætta vegin, og kunnu vit staðfesta, at vit eru komnir upp um 600 virknar limir á fyrsta sinni, sum er 100 fleiri enn vit vóru fyri bert fýra árum síðani. Tað vísa seg eisini at vera ávísar flytingar í limaskaranum, har vit síggja, at limatalið í fiskivinnuni stendur nøkulunda í stað, meðan talið veksur á handilsskipum og á landi.

## Nevndin óbroytt

John Højstend og Jóhan Mørkøre stóðu fyri vali á aðalfundinum í ár. Teir stillaðu báðir uppaftur, og tað gjørdi Tróndur við Á, sum ikki fekk verið til staðar á sjálvum aðalfundinum, eisini. John Højsted og Jóhan Mørkøre blivu báðir afturvaldir.

Sum eykalimir blivu Andrass Poulsen og Tróndur við Á valdir.




# TAK SKEIÐINI
# TÁ TÚ ERT HEIMA

## Vit hava nýggjastu tøknina og bestu umstøðurnar at læra nýtt.

Siglir tú úti ella heima er tað ómakaleyst at taka skeiðið hjá okkum. Vinnuháskúlin hevur í 130 ár útbúgvið tey bestu av teimum bestu.

### VIT BJÓÐA ØLL SKEIÐ

- BRM-skeið
- ECDIS-skeið
- GOC-skeið
- DP-skeið
- Eldsløkkingar-skeið
- SSO-skeið
- ERM-skeið
- Tecdis-skeið
- Heilsu-skeið
- ARPA-skeið
- Trygdar-skeið
- Stroppa-skeið

... og nógv onnur skeið

Finn skeiðsyvirlit og tilmelding á
**www.skeid.vh.fo**

**VINNUHÁSKÚLIN**
CENTRE OF MARITIME STUDIES & ENGINEERING

Vinnuháskúlin · Boks 104 · 110 Tórshavn
Tel 350 250 · info@vh.fo · www.vh.fo

SENDISTOVAN

# Koyrandi landstreymur í Havn



*Tórshavnar Havn hevur fleiri smærri úttøk til landsstreym, men megin er ikki nóg stór til stór skip ella skip, sum hava frystigoymslu ella arbeiða við spølum og kranum*

**Meðan tað aðrastaðni verður brúktur landssreymur fyri at minka um dálking frá ljósmotorunum, so er tað óljóðið frá skipum við bryggju, sum førir til ynskið um landstreym**

**Tekstur og myndir:**
Øssur Winthereig – press

Fyrsta stigið at sleppa av við mest larmandi skipini í Tórshavnar Kommunu verður nú tikið.

Tórshavnar Býráð samtykti í september at seta pening av til at keypa ein ljósmotor, sum verður settur inn í eina bingju, sum verður sett á ein lastbil.

Einfalda loysnin við larmi er, at bingjan verður serliga væl ljóðbjálvað.

Men enn er trupulleikin, at fá skip eru útgjørd at taka móti landsstreymi.

– Aðrastaðni hava tey eisini royndir við landsstreymi, men tá er endamálið oftast at sleppa undan dálking, eitt nú sváulútláti ella nox, sigur Báður Michelsen, tekniskur málsviðgeri hjá Tórshavnar Havn. Nógvar av havnunum, sum skip brúka uttanlands, liggja avsíðis, so óljóð er ikki tann stóri trupulleikin.

Í Føroyum liggja flestu havnaløgini næstan í bygdum øki, so har gerst óljóðið nakað, sum havnirnar skulu taka við, og sum tykist órógva summar borgarar.

Krøvini til útlát frá skipunum eru herd – til dømis kravið um svávulinnihald í oljuni.

**Tónleikabingja**
Jóhannes Steingrund, sum eigur Steingrund Akustik, fekk huskotið um at minka um larmin frá skipum við bryggju úr tónleikavinnuni, har streymforsýningar ofta standa tætt við tónleikapallarnar, men krøvini eru stór fyri, at motorljóðið ikki skal órógva tónleikin.

Tað eru Jóhannes Steingrund og El-talvuvirkið í Gøtu, sum skulu lata fyrstu flytbaru landsstreymsskipanina til Tórhavnar Havn.

– Servitanin hjá tí fyritøkuni, sum vit arbeiða saman við, er, hvussu bingjur kunnu ljóðbjálvast, sigur Jóhannes Steingrund.

Tórshavnar Býráð avgjørdi at keypa eitt flytbart generatorsett av fleiri orsøkum.

Í tilfarinum, sum býráðspolitikarar fingu um landsstreymsskipanina, stóð millum annað:




*Nógv skip skulu gera íløgur í eltalvur og inntøk fyri at kunna taka ímóti landstreymi*

"Tórshavnar Havn hevur í longri tíð arbeitt við at finna loysnir fyri at kunna veita skipum landstreym, eisini teimum skipum, ið hava tørv á nógvum landstreymi, t.d. uppsjóvarskip og frystifarmaskip. Stórar avbjóðingar eru tó í sambandi við at fáa gjørt eina landstreymsskipan.

Ein avbjóðing er, at tekniska útgerðin og íbindingargjald til SEV er kostnaðartungt. Ein onnur avbjóðing er, at ein føst landstreymsskipan, ið fær streym frá netinum hjá SEV, gerst rættiliga ósmidlig, soleiðis skilt, at íbindingarstøðini verða bert á ávísum stað/støðum. Vansin er tí, at skip, ið liggja við kai aðrastaðni enn júst har, ið íbindingin er staðsett, ikki kunnu fáa gagn av slíkari skipan."

## Tvey-trý samdøgur

Generatorurin, sum Tórshavnar Býráð fer at keypa, er ein 1000 KVA ella 800 KW generatorur, og hann skal kunna veita streym við frekvensum millum 50 Hz og 60 Hz og við spenningi frá 380 V til 440 V.

Ætlanin er, at á bilinum, har generatorurin verður settur, verður ein innbygdur tangi til 5000 litrar av disel.



*Káplarnir, sum vera brúktir til nýggja generatorin, eru 185 kvadrat, sum lýkur ISO-góðkenningina*

Tað skuldi rokkið til eitt samdøgur við fullari megi, sum er 1000 KvA. Men fægstu skipini, sum kunnu taka ímóti landstreymi, krevja fulla megi alla tíðina. Til eitt vanligt uppsjóvarskip skuldi streymurin rokkið til einar tveirtríggjar dagar.

Jónsvein Lamhauge, havnameistari í Tórshavnar havn, sigur, at megin á nýggja generatorinum er nóg stór til so at siga øllum skip, sum koma til kai.

Í tilfarinum, sum býráðslimirnir í Tórshavnar Kommunu fingu, stendur eisini:

"Skipanin er smidlig, tí hon kann setast júst har, ið skipið liggur, og hon kann flytast ímillum ymsu bryggjurnar, t.d. Kollafjørð, Oyrareingir, Sund og Tórshavn. Harvið verður møguligt hjá nógv fleiri skipum at knýta í skipanina (treytað av tey eru útgjørd til tess), og harvið at minka um larmvansar á ymsum støðum."

Jónsvein Lamhauge heldur, at hetta er ein góð byrjan, men hann ásannar eisini, at hetta er ikki nakað lætt mál at loysa.

Í fyrsta lagi kann bara eitt skip í senn vera knýtt at generatorinum, men størri trupulleikin er, um skipini, sum koma inn, yvirhøvur hava útgerð at taka í móti landsstreymi.

– Eg vildi sagt, at tað eru fá av skipunum, sum hava neyðugu útgerðina, sigur Jónsvein Lamhauge.

Um skipini eru sinnað at gera íløgur í útgerð, so tey kunnu taka móti landsstreymi, veit hann ikki.

– Kanska er íløgan einar 400.000 krónur til 600.000 krónur, gitir Jónsvein Lamhauge.

Íløgan umborð fyri at gera eitt skip klárt at taka móti landsstreymi er, at el-talvurnar skulu útbyggjast, og káplar og eitt inntak skulu leggjast út á dekkið ella út til lynningina.



*Ætlanin hjá Tórshavnar Havn er, at flytbari generatorurin kann flytast runt til kai-kantarnar, har skipini, sum kunnu taka landstreym, kunnu taka av tilboðnum*

Káplarnir, sum ætlanin er at brúka til generatorin, eru 185 kvadrat, har hvør kápil kann klára 350 A.

Mesti streymurin, sum generatorurin kann framleiða, er 1400 A.

Generatorurin hevur eini fýra-fimm úttøk, so arbeiðið í landi er at draga einar fýra-fimm káplar umborð. Á generatorbilinum vera eisini kápultrumlur til fleiri káplar á eini 30 til 50 metur.

Vektin á káplunum er 4 kg/m.

## Verandi streymúttøk

Tórshavnar Havn hevur fleiri streymúttøk til minni skip, og MEST hevur eisini fleiri úttøk til skipini, sum liggja við bryggju ella bíða eftir at vera tikin upp.

Megin í úttøkunum, sum Tórshavnar Havn hevur í dag, er ikki nóg stór til at føða frystiskip ella skip, meðan tey brúka spøl og kranar.

Tórshavnar Havn hevur 63 A og 125 A úttøk, og svarar tað umleið til 43 KvA og 86 KvA, so munurin er stórur upp til nýggja generatorin, sum er 1000 KvA.



Skipini, sum brúka landsstreym frá Tórshavnar Havn, eru ofta skip, sum skifta manning ella liggja og bíða.

- Summi skip velja landsstreym, sjálvt um rindast skal fyri hann, tí minni eftiransing er, so meginparturin av manningini kann fara til hús, sigur Bárður Michelsen á Havnaskrivstovuni í Havn.

## Nýggj krøv

Steingrund Akustik hevur gjørt fleiri kanningar av óljóðið kring Føroyar. Teir hava mátað óljóðið í Kollafirði, í Runavík, í Klaksvík og Vestmanna.

Fleiri av hansara kanningum vísa, at óljóð er frá fleiri skipum, sum er hægri enn altjóða krøvini áseta. Beinleiðis krøv eru ikki í føroyskari lóggávu, men altjóða leiðreglur verða brúktar.

Ljóðkrøvini til nýggju generator-bingjuna, sum Tórshavnar Kommuna skal hava, eru, at hon skal ikki larma meira enn 55 dB sjey metrar frá motorinum. Hetta kann samanberast við, at kravið, sum verður brúkt í bygdum øki fyri larm um náttina, er 35 dB.






*Jónsvein Lamhauge, havnameistari í Tórshavnar havn, metir, at fá skip hava útgerð at taka ímóti landsstreymi*

Men sjálvt um ein nýggjur lastbilur við eini bingju við einum ljósmotori í er tøkur í kommuni at koyra, har skipini leggja at, so hevur havnameistarin ella annar mynduleiki ikki nakran rætt at krevja, at eitt skip skal brúka landsstreym.

– Skipini avgera sjálv, um tey vilja brúka landsstreym. Vit kunnu upplýsa, at vit hava ein generator tøkan, annað kunnu vit ikki gera í løtuni, sigur Jónsvein Lamhauge.

Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at hann arbeiðir við at gera felagsreglur fyri allar havnir í landinum.

– Vit ætla at seta eitt mesta mark fyri larmi í øllum havnum í landinum, so mugu havnirnar sjálvar umsita tey krøvini, sigur Helgi Abrahamsen.

## Onga umsókn um landstreym

Um íløgurnar til landstreym sigur SEV, at elfelagið viðurkennir, at íløgan til landsstreym er stór.

– Íløgan í landsstreym til stóru skipini er stór og møtumikil fyri tær einstøku kommunurnar. Sum skilst, aftra kommunurnar seg at gera neyðugu íløguna, millum annað tí at tær meta tað vera kappingaravlagandi, tá kravið til skip um landsstreym ikki er tað sama í øllum havnum. Eisini er óvist, hvussu íløgan kann vinnast inn aftur.

– Tað er okkara fatan, at kommunurnar sakna eina felags reglugerð frá landsmyndugleikunum, sum ásetir rammur og reglur, sum eru felags fyri øll, sigur SEV á heimasíðuni.

Tá talað verður um útreiðslurnar, sum eru tengdar at landsstreyminum, verður íbindingargjaldið hjá SEV javnan nevnt sum ein av avbjóðingunum.

SEV vísir á, at ført hevur verið fram, at íbindingargjaldið er ein forðing fyri at fara undir íløguna við landsstreymi, og at SEV møguliga átti at lækka gjaldið, fyri at lætta um hjá teimum kommunum og vinnukundum, sum standa fyri at skula gera íløgu í landsstreym.

Men SEV heldur seg ikki kunna lækka gjaldið, tí elfelagi sigur, at íbindingargjaldið er felags heiti fyri inntøkurnar, sum skulu til fyri at gjalda íløgurnar til uppseting av transformarastøðum og kaðallegging. Íbindingargjaldið er ikki eitt avgjald, men ein verulig útreiðsla, sum skal til fyri at útbyggja netið hjá SEV í sambandi við alt millumspennings- og lágspenningsnetið, skrivar SEV á síni heimasíðu.



*Nakað soleiðis vænta tey í Tórshavnar Havn, at bilurin við generatori fer at síggja úr. Men pláss skal eisini vera fyri kaðaltrumlum og oljutanga*



*Dallin skimast út gjøgnum vindeygað, og hugurin fer ivaleyst aftur á mongu árini á heimshøvunum*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

# Frá damp-maskinu til nútímans motorar

**Daniel Jacob Olsen, vanliga kallaður Dallin, hevur stóran part av lívi sínum arbeitt sum maskinmeistari. Hann hevur millum annað arbeitt við dampmaskinu umborð á Stella Argus í Barentshavinum og við nýggjari og framkomnum maskinum í skipum úti í stóru verð. Einaferð mistu teir ein mann í ódnarveðri á Reykjanesrygginum**

**Tekstur:** Grækaris Djurhuus Magnussen – PRESS

Vit sita í hugnaliga kamari hansara í Eldrasambýlinum oman Hoydalar í Hoyvík, Daniel Jacob Olsen, vanliga kallaður Dallin, og undirritaði. Hann er 95 ára gamal hendan dagin, frískur og vitugur. Og væl nøgdur við at búgva her. Hann letur væl at bæði starvsfólki og búðfólkum, og so er maturin eisini so framúr góður. Hann er ógvuliga virkin, tað hevur hann verið, heilt síðan hann gavst at sigla sum maskinmaður. Og nú, hann er fluttur inn á Eldrasambýlið oman Hoydalar, er hann framvegis virkin.

– Eg geri fimleik á Boðanesheiminum hvørja viku, og eg eri í Norðurlandahúsinum eina ferð um vikuna, har vit vestmenningar hittast. So eri eg heima hjá børnunum viðhvørt, biltúr við soninum. Jú, eg fái væl og virðiliga dagarnar at ganga, heldur hann.

Hendan dagin tosa vit lítið um arbeiði hansara sum maskinmeistari, men avtala at hittast til veruligu samrøðuna seinni. Men ólukkutíð, so fingu vit koronu, og eg skapp ikki at vitja Dallan fyrr enn nakrar vikur seinni. Og áðrenn samrøðurnar vóru lidnar, hevði Dallin fylt 96 ár.

## Føddur í 1924

Daniel Jacob Olsen varð føddur í Havn hin 24. august í 1924, men vaks upp í Vestmanna. Hann letur væl at uppvøkstrinum í Vestmanna, tí har var gott at vaksa upp. Umframt at ganga í fjøruni, fiska ternumurtar og spæla ymisk spøl, gjørdu teir "fortreð", men tað var ikki altíð, at tað eydnaðist so væl.

– Einaferð høvdu vit krøkt ein krók í eitt vindeyga, og háláðu so í endan fyri at banka uppá, men tað riggaði ikki. Vit gingu so oman aftur, og tá vit skuldu taka krókin, fór vindeyga upp, og ein spurdi: Ná, var hatta stuttligt, og so var alt spilt, flennir Dallin.

Hann hevði altíð pisur, skurðapisu, lomvigapisu, ritupisu og eina ferð hevði hann ein havhestaunga sum pisu. Men tað riggaði illa við havhestaunganum, tí hann hevði bara dún.

## Fiskaarbeiði og útróður

Frá tí, hann var 12 ára gamal, arbeiddi hann fisk eftir skúlatíð. Tá hann var konfirmeraður í oktober í 1938 og liðugur við 7. flokk, arbeiddi hann í fiski fulla tíð. Lønin tá var 38 oyru um tíman. Tá hann var 16 ára gamal, varð hann biðin at halda vakt í Turkihúsinum, og tá hækkaði tímalønin upp í 1 krónu og 3 oyru. Men hetta var so stutt, tí onkur kærdi til sýslumannin um, at Dallin var ov ungur til hetta arbeiðið, og tískil misti hann tað.

– Til kríggið var liðugt, róði eg út við einum 5-mannafari saman við trimum eldri monnum, Hendrik á Deild og Hans Paula á Heyganesi, og tá Hans Pauli ikki var við, var ein, vit rópti Christian á Válinum við í staðin. Vit plagdu at vera út fyri Saksun við línu, har var so øðilig hýsa at fáa, greiðir Dallin frá.

Onkuntíð hevði hann verið í Dansistovuni sunnukvøld, og júst tørnaður inn, tá teir komu at purra út mánamorgun. Tá kundi vera hart at seta seg í 5-mannafarið at egna við hálvrotnari gággu. Sjóverk hevði hann eisini fyrstu tíðina.

– Keyp tær eina skrá, so sleppur tú av við sjóverkin, segði ein av hesum eldru monnunum, og tað gjørdi hann. Tá hvarv sjóverkurin, sigur hann.

## Á Suðurlandið

Eftir kríggið fór Daniel Jacob Olsen fyrsta túrin til skips, og tað var við trýmastraðu skonnartini, Havfrúnni. Teir vóru við snøri. Men hann var bara hendan eina túrin, tí hann hevði so nógva pínu í økslini, og fekk tí illa drigið snørið. Trupulleikin í økslini stavaði frá einaferð, hann var dottin í urðini.

Dallin fekk 1.300 krónur fyri hendan fyrsta túrin. Júst um hetta mundi teknaði Jóan Jacob í Garðastovu partapening til trolaran Gullfinn, og Dallin hevði teknað seg fyri eitt partabræv upp á 1.000 krónur. Tá hann fekk avrokningina, fór hann beina leið at gjalda fyri partabrævið, restina gav hann mammu síni.

– Eg slapp so við Gulfinni. Systkinabarn mítt var maskinmaður, so eg var nógv niðri í maskinrúminum. Har varð eg settur sum lempari í byrjanini, eg skuldi altso lempa kol út á dúrkið til fýrbøtaran. Í fríløtunum lærdi eg meg at fýra, greiðir hann frá.

Soleiðis byrjaði yrkisleiðin hjá Dallanum sum maskinmaður.

Hann fór síðan fyrst ein túr við einum trolara úr Aberdeen, áðrenn hann fór við einum skipi hjá Jógvan Elias Thomsen í Sandavági, Mary Margreth. Eftir hetta sigldi hann sum fýrbøtari í trý ár, áðrenn hann í 1949 avloysti sum annarmeistari við Stella Argus.

Dallin var fleiri túrar við Stelluni, og hann letur illa at hesum skipinum. Hann heldur, at Stellan var eitt ringt sjóskip.

– Hasir trolarnir høvdu hug at leggja seg, serliga Stella Argus, og serliga, tá hann var kolabrendur. Tað ráddi um at taka frá beinanvegin, tú merkti, at hon legði seg. Og so skuldi hon bakkast spakuliga uppaftur. Í 1949 og 1950, tá eg var við, hendi tað eisini, men vit vóru ungir og raskir, og løgdu kanska ikki so øðiliga nógv í tað tá, sigur Daniel Jacob Olsen.

Hann minnist ein túr, teir skuldu í dokk í Týsklandi við Stelluni. Á veg til Týsklands, steðgaðu teir at lossa saltfisk í Danmark, og fóru so víðari til Týsklands. Men har noktaðu myndugleikarnir manningini at fara í land, tí teir vóru so ungir. Elsti maður umborð var bara 31 ára gamal, og tað var stýrimaðurin, sum teir róptu Andreas hjá Atu. Hann var ættaður úr Sandavági.

– So ung var manningin, at týskararnir noktaðu okkum at fara í land, flennir Dallin.

Stella Argus ella Stellan, sum hon eisini varð kallað, fórst við mann og mús 27.- ella 28. oktober 1957. 22 mans vóru



*Daniel Jacob Olsen á hugnaliga kamari sínum í Hoyvík*

*Mynd: Grækaris Djurhuus Magnussen*

við, og teirra millum vóru ikki færri enn átta kvívíkingar. Av teimum átta kvívíkingunum vóru fýra brøður, yngsti beiggin var bara 15 ára gamal.

## Út at sigla

Dallin sigldi eitt skifti við Smyrli, men hann hevði alla tíðina hug at fara út at sigla. Endin var, at bæði hann og beiggi hansara fóru út at sigla við skipum hjá norskum reiðaríi. Samstundis fóru teir upp á skúla í Noregi. Teir skiftust at vera úti og á skúlabonki, á tann hátt kundu teir hjálpa hvørjum øðrum við skúlanum.

Hann fór fyrst umborð á ein lítlan eldri bát, men teir vóru í havn so ofta, og tað gav lítlar pengar. Tí útvegaði hann sær hýru við einum størri skipi, hetta var ein sonevndur "Liberty-bátur" upp á umleið 11.000 tons. Beiggi hansara fór við einum líknandi báti, og teir vóru báðir fýrbøtarar fyrstu tíðina.

– Hesir libertybátarnir vóru hópframleiddir í USA. Ein partur varð gjørdur á einari smiðju, ein annar á aðrari smiðju, og ein triði á uppaftur aðrari smiðju og so framvegis. Síðan vórðu partarnir savnaðir á einum stað, og settir saman til skip, greiðir Dallin frá.

Útbúgvingarnar í Noregi vóru eitt sindur øðrvísi enn í Føroyum, og í sjóvinnubrævinun hjá Daniel Jacobi stendur, at hann hevur útbúgving sum "skipsmaskinmeistari av 3. stigi".

– Tað var stórur mangul upp á norska ella norðurlendska manning umborð á norskum handilsskipum tá. Til dømis vóru 4.000 spaniólar eitt skifti við norskum skipum, og haraftrat komu grikkar og italiumenn. Tí komu umboðsmenn fyri ymsu reiðaríini inn á skúlarnar at fáa fatur á okkum, tá vit vóru um at gerast lidnir við útbúgvingarnar, sigur Dallin.

Soleiðis hevði hann fingið tjans í somu løtu, sum hann var útbúgvin. Hann hevði fyri nógv tað mesta siglt við damparum, men nú skuldi hann við einum turbinbáti, og tí skuldi hann mynstra sum triðimeistari.

– Hendan fyrsta túrin fór eg úr Kristiansand, har skúlin var, til Oslo, og haðani við flúgvara til París. Og so við tokið til havnarbýin, har skipið, Espen, lá. Hetta var í 1959. Tá eg kom umborð, stóð maskinsjefurin fyri mær, og eg fekk boð um at vera fyrstimeistari og ikki triðimeistari. Eg hevði hug at mæla ímóti, tí eg hevði siglt so lítið við motori, eg hevði siglt mest við dampi. Men hann vísti mær bara inn á kamarið hjá fyrstameistaranum og segði, at hann skuldi leggja mær lag á. Teir vóru í ferð við at skifta leiðir, og hann bað meg bara fylgja væl við tí arbeiðnum.

Úr Fraklandi fóru teir til Amsterdam

og haðani til Hamburg, og trupulleikin við tí eina leiðinum helt fram. At enda funnu teir útav, at onkur, sum hevði umvælt krússhøvdið frammanundan, hevði mist ein møtrikk niður í oljukanalirnar og latið sum onki. Har hevði møtrikkurin so ligið og órógvað í longri tíð.

Úr Hamburg fóru teir til Finnlands eftir timbri til USA, og úr USA fóru teir við “Espen” til Vancouver í Kanada, har teir lastaðu stórar timburstokkar til havnaútbyggingina í London.

– Tá vit vóru komnir til London, segði eg upp, tí eg skuldi til Føroyar at giftast, men tað var ikki bara sum at siga tað at fáa avmynstring, tí teir høvdu brúk fyri mær. Endin var, at teir bjóðaðu mær at fara heim beinanvegin, so eg kundi koma umborð eina viku seinni, tí tað tók eina viku at lossa, greiðir Dallin frá.

Hann fór so við flogfari til Keypmannahavnar, og haðani til Esbjerg, har hann slapp heim til Føroya við einum donskum coastara. Men teir fingu dundrandi mótvind, og eina náttina ætlaði danski skiparin at leggja stilt, tí hann var ikki vanur at sigla í tí farvatninum. Tá helt Dallin fyri við ein annan føroyskan ferðamann, sum var skiparalærdur, um hann ikki kundi yvirtaka vaktina á brúnni. Jú, tað gjørdi hann, og tískil sigldu teir alla náttina.

Soleiðis vóru treytirnar at ferðast sum útisiglari tá. Haraftrat komu longu túrarnir, sum kundu vera úr hálvum ári upp í eitt heilt ár.

Dallin sigldi við fleiri stórum skipum, og hann kom í nærum øll heraðshorn. Til dømis var ein farleið úr Evropa til Japan, og úr Japan til Avstralia. Á veg til Avstralia løgdu teir inn á Jólaoynni. Á Jólaoynni hitti hann ein føroying, sum var arbeiðsformaður í havnini á oynni.

Eitt ár sigldi hann við forsýningum út til avstralsku oyggjarnar norðanfyri Avstralia.



*Dallin og konan, Paula Maria, avmyndaði umborð á einum av skipun, hann sigldi við*

*Privatmynd*


# Rein góðska úr norður Atlantshavi



www.cig.fo




*Eitt av skipunum, Daniel Jacob Olsen sigldi við, var Essi Gina. Skipið sigldi í 15 ár í kolafarti millum Baltimore og USA. Hann var smíðaður í Onglandi, men skipasmiðjan fór á heysin, tá skipið var latið eigarunum. Tað hevði sveisiskan motor. So illa bar til hjá teimun, at teir noyddust at nýta kertiljós, tá leiðini skuldu passast til. Skipasmiðan hevði ikki goldið fyri ravmagnið, og tí var sløkt. Loysnin vóru kertiljós*

*Privatmynd*

Hann sigldi nógv við norskum skipum, men eitt stutt skifti sigldi hann við føroysku skipafelagsbátunum. Men honum dámdi betur at sigla úti, og tí fór hann út aftur at sigla. Eitt av skipunum, hann sigldi við í áttatiárunum, var Iceberg.

**Mistu mann á Reykjanesrygginum**

Teir sigldu nógvar túrar úr Grønlandi til Aalborg  við Iceberg - onkuntíð við stykkjagóðsi og aðrar tíðir við millum annað rækjum. Ein av hesum túrum fingu teir ein skaðasjógv og mistu ein mann. Hendingin fór fram hin 26. oktober í 1981, og teir vóru farnir frá Sukurtoppinum og vóru á veg til Aalborg við rækjum.

– Tá vit vóru komnir á Reykjanesrygginin, fingu vit ein stóran sjógv. Helvtin av rútunum á brúnni brotnaðu, og brúgvin fyltist við sjógvi. Trýstið var so nógv av hesum, at hurðin aftur av brúnni varð skrødd upp, og allir motorarnir slóknaðu. Eg var sjálvur á vakt í maskinrúminum, tá vit fingu sjógvin, greiðir Dallin frá.

Sjógvurin var so stórur, teir fingu, at skipið lá púra flatt á síðuni. Dallin arbeiddi í bakborði, tá sjógvurin legði seg inn yvir skipið, og tá avtornaði, lógu deilirnir, hann júst hevði skift út, uppi undir millumdekkinum í stýriborð.

Teir vóru tveir maskinmeistarar og ein motormaður at ansa motorunum umborð.

Nú fóru teir sum skjótast í holt við at fáa motorarnar at starta aftur, so teir kundu verja skipið í vánaliga veðrinum. Ljósmotorurin vildi ikki starta í fyrstu syftu.

– Eg leyp aftur til stýrimaskinuna, tí har stóð neyðagregatið. Tá eg gekk fram aftur gjøgnum verkstaðið, hoyrdi eg, at teir royndu aftur, og tá startaði hann. So var at fáa høvuðsmotorin í gongd aftur, og tað gekk væl, hann fór í gongd aftur beinanvegin, sigur hann.

Nú fór Dallin runt í skipinum at hyggja eftir, um alt var í lagi. Tá sá hann millum annað, at ein stórur kassi við eykalutum til frystikompressarararnar varð tveittur út á dekkið millum øll rørini frá frystikompressarunum.

– Kassin stóð festur við vinkuljørnum, men kortini varð hann tveittur út



*Miðskeiðis í 1950-unum sigldi hann við Valhall. Í 1954 fingu teir ein skaðasjógv í Japanshavinum, tá teir vóru á veg til Bergen við eini kolalast. Teir høvdu fýra bjargingarbátar miðskips, og tríggir fóru í knús. Tveir bjargingarflakar til 20 mans hvør stóðu har afturi, og annar teirra varð tveittur fyri borð – tvørturum skipið*

*Privatmynd*

#1 NAVNIÐ INNAN BATTARÍ LØÐITÓL
KRING ALLAN HEIMIN.

Schumacher®



// BATTARÍ LØÐITÓL

// BOOSTARAR

// BATTARÍ TESTARAR

// ARBEIÐSLJÓS

FÆST NÚ Í FØROYUM

KBI
info@kbi.fo
+298 610 200

PÓLAR
polar@polar.fo
+298 611 300

millum hesi rørini. Til alla lukku rakti hann onki rør, gjørdi hann tað, so hevði maskinrúmið fylst við freongassi, og so sat eg ikki her í dag, sigur Dánjal Jacob Olsen og hyggur hugsunarsamur út gjøgnum vindeygað her í Sambýlinum í Hoyvík.


*Góður hýrur umborð. Dallin situr uttast høgrumegin*

*Privatmynd*

## Mayday

Tá teir høvdu fingið gongd aftur í frystikompressarnar, fór Dallin upp á brúnna at kanna, hvussu vorðið var haruppi. Tá hann kom á brúnna var stýrimaðurin í gongd við at fylla brotnaðu rútarnar við gummipútum, sum vanliga vóru nýttar at stúva av við í lastini. Øll tólini á brúnni vóru oyðiløgd.

– Tá sjógvurin sprongdi hurðina upp aftur úr brúnni, fylgdi ein av manningini við. Hetta var ein argjamaður, og hann sást ongantíð aftur, greiðir Dallin frá.

Skiparakamarið var so illa farið, at hevði skiparin verið í kamarinum, tá teir fingu sjógvin, hevði hann ikki komið livandi frá tí. Men tíbetur lá hann á sofuni í salongini, tá teir fingu sjógvin.

Neyðsendarin var vatntættur, so hann brúktu teir at senda út mayday.


*Dallin í góðveðri – og í kaskett*

*Privatmynd*

Zacharias Bærentsen, sum sigldi við einum av hinum skipunum í reiðaríinum, hoyrdi neyðarkallið beinanvegin, og setti seg í samband við Iceberg. Tá var tað so heppið, at teir lógu stutt norðanfyri vanlukkurakta skipið, og kundu vera hjá teimum tveir tímar seinni. Teir vóru annars á veg til USA.

Stýrigreyðirnar vóru farnar umborð á Iceberg.

Seinni kom eitt annað skip, sum var á veg til Danmarkar, til teirra, og teir lovaðu at sigla frammanfyri Iceberg til Aalborg.

Tað gekk væl hjá teimum at koma til Aalborg, har skipið varð tikið upp á sleipistøð.

## Gavst í 1992

Daniel Jacob Olsen sigldi sum maskinmeistari í ellivu ár aftaná óvgusliga sjógvin á Reykjanesgrunninum í 1981. Í 1992 kom hann í eftirlønaraldur, og tá noyddist hann úr starvinum sum maskinmeistari í føstum starvi.

Hann gavst kortini ikki heilt, tí stutt eftir at vera farin frá fyri aldur, fór hann sum maskinmeistari í Barentshavið við trolara. Har hevði hann ikki verið, síðan hann var við Stelluni og Gulfinni, áðrenn hann fór út at sigla ein lítlan mansaldur frammanundan.

Hann hevur eisini verið onkran trolaratúr sum maskinmaður undir Føroyum.

Dallin hevur havt fleiri frítíðarítriv. Hann hevur lisið nógv, serliga bøkur, sum hava við sjógvin at gera, hann hevur gjørt modellbátar, og so hevur hann gingið á kvøldskúla, har hann millum annað hevur lært at gera smúkkur úr silvuri. Og ættargransking hevur hann eisini havt áhuga fyri.

## Stór broyting

Veldugar broytingar hava verið bæði í fiskivinnuni og farmavinnuni hesi mongu árini, Daniel Jacob Olsen hevur siglt sum maskinmeistari. Eitt er, at hann fekk um endan á kolafýrdu damptrolarunum og seinni kom at arbeiða við nýggjum og framkomnum bæði motorum og skipum, men eisini á annan hátt er nógv broytt umborð á skipunum.

– Bátarnir gjørdust nógv betri, og manningarrúmini gjørdust eisini nógv betri. Tað er ein stórur munur, og hetta hevur gjørt tað hugaligari at vera umborð. Og útbúgvingin sum maskinmeistari gevur eisini nógvar møguleikar í dag, tú kanst til dømis altíð fáa arbeiði á landi, um tú hevur hug til tað, heldur Dallin.


Nýggj og slóðbrótandi
jarðhitapumpa
Thermia Calibra
hevur upp til 5,8 SCOP
SK SVENDKROSSTEIN
Les meira á Krosstein.fo
Thermia


EYKALUTIR
www.mest.fo
MEST
SHIPYARD
24/7 TÆNASTA – RING +298 79 11 00
Lætt at bíleggja umvegis
telefon ella teldupost
24/7 tænasta
Størsta og besta goymsla
í landinum
SØLUBÚÐ | SHOP
Sølubúð/goymsla í Havn,
Runavík og á Skála
Vit koyra kring alt landið
Álítandi tænasta
MEST P/F · J.C. Svabosgøta 31 · P.O. BOX 65 · FO-110 Tórshavn · tel: +298 301100 · sales@mest.fo

# Sjóvarfalsverkætlan í Vestmannasundi



SEV samstarvar við svensku fyritøkuna Minesto um royndarverkætlan við sjóvarfalsorku, sum fevnir um tvær sjóvarfalsorkuturbinur (drekar) í Vestmannasundi.

Hvør dreki er 5m breiður og vigar 1,7 tons. Drekarnir eru festir í botnin, og ferðast við 6-10 m/sek í eitt áttatal.







## ÁVARING

Ikki er loyvt at sigla ella fiska í verkætlanarøkinum. Vandi er fyri skaða á Minesto drekarnar og/ella fiskireiðskapin.

Kemur tú í samband við drekarnar, ella varnast tú eitthvørt óvanligt við drekunum ella djóralívinum í økinum, vinarliga ring ella skriva til SEV.

E-mail: menning@sev.fo
Tel +298 34 68 00

Skanna QR-kotuna fyri at síggja staðsetingina av verkætlanini á Google Maps.


Minesto www.minesto.com
info@minesto.com

**Nærri kunning**
*For further information*

SEV www.sev.fo
sev@sev.fo

# Til minnis um Eydnu Bernhardson

**Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskinmeistarafelagnum, endaði sína formansrøðu á aðalafundinum við hesum minningarorðum um Eydnu Bernhardson, ið andaðist 16. desember 2019:**

Hin 16. desember fingu vit tey tungu boð, at Eydna Bernhardson, skrivstovukvinnan hjá okkum, var farin. Eydna starvaðist í mong ár sum skrivstovufólk hjá felagnum. Eydna var sera fitt og fyrikomandi og altíð klár við tí góða orðinum. Hon var álítandi, arbeiðssom, og hennara partur lá ongantíð eftir. Hon var so løtt at verða saman við, og tú føldi teg altíð væl til passar í hennara selskapi.

Hon var eisini sera kreativ, og sást hettar serliga aftur innan málningalistina, har hon var sera virkin, men tað lá eisini raðið fyri at yrkja.

Eydna Bernhardson bleiv fyri góðum tveimum árum síðani rakt av herviligari sjúku, og hóast drúgva viðgerð mátti hon at enda geva skarvin yvir.



*Eydna Bernhardson andaðist 16. desember 2019*

*Privatmynd*

Vit vóru og vitjaðu hana í heimi hennara fyrst í desember, og hóast merkt av sjúku, var lagið avbera gott, og vartaði hon okkum upp við kaffi og køkum. Prátið gekk eisini lystiliga bæði um leyst og fast, og var talan um eina serliga hugnaliga løtu.

Teir seinastu dagarnar gekk tað skjótt afturá, og mánadagin 16. desember orkaði likamið ikki longur, og so var seinasti teinurin rógvin.

Eydna fór til gravar úr einari stúgvandi fullari Havnar Kirkju fríggjadagin 20. desember. Ann Dahl Hansen prestur hugleiddi um Eydnu, og var tað sera kensluborið og rørandi at lýða á, ikki minst tá hon bar fram eina seinastu heilsan, sum Eydna sjálv hevði biðið hana um at gera við jarðarferðina.

Jú, tað er heilt víst, at Eydna er nógv saknað her úti á felagnum, og tankar okkara eru hjá teimum, sum eftir hana sita.

# 18 nýggir maskinmeistarar

**25. juni fingu 17 nýggir maskinmeistarar síni prógv handað á samkomu á Vinnuháskúlanum, og 18. september fekk Kristian Clementsen prógv sum maskinmeistari.**





*18. September fekk Kristian Clementsen prógv sum maskinmeistari.*

*Mynd: Vinnuháskúlin*

*Tey, ið fingu prógv 25. juni, eru Eyðun Sofusson á Dalbø, Janus Jóhanson Olsen, Jóannes Thomsen, Bárður Jógvansson Hansen, Búgvi Petersen, Dávid Langgaard, Heini Aagaard Olsen, Jóhann Christiansen, Jón Áki Jacobsen, Magnus Helgi Langgaard, Martin Eliasen, Per Langgaard, Rúni Tindskarð Jacobsen, Sámal Rasmussen, Fríði Sigurðsson, Jóhannes Petersen og Rasmus Mortensen Potts.*

*VIRÐISLØNIR:*
*1. Eyðun Sofusson á Dalbø, grindaknív frá SEV. 2. Jóannes Thomsen, mátitól frá Maskinmeistarafelagnum. 3. Janus Jóhanson Olsen, kikara frá Norðoya Sparikassa.*

*ÍDNISVIRÐISLØN: Rasmus Mortensen Potts, lummaur frá Skansa Offshore.*
*Mynd: Erland Hentze Rasmussen*

# Allir sáttmálarnir komu undir land

**Tað gekk striltið at koma fram at samráðingarborðunum, men nú árið er um at vera runnið, er slætt borð viðvíkjandi teimum stóru sáttmálunum hjá Maskinmeistara-felagnum. Samráðingarnar um sáttmálan við grønlendska Polar Seafood eru tó komnar í drag. Orsøkin er ein ósemja um avrokningarhátt**

**Tekstur:** Ingolf S. Olsen – PRESS

Tað er meira reglan enn undantakið, at sáttmálarnir hjá Maskinmeistarafelagnum koma í drag, tí arbeiðsgevarasíðan letur bíða eftir sær. Aðrir sáttmálar mugu fáast av vegnum fyrst, plagar grundgevingin at vera, men hesaferð er so eisini ein onnur tungtvigandi grundgeving fyri seinkingunum, nevniliga korona.

Men nú tað stundar til jóla, og árið er um at renna út, kann formaðurin kortini staðfesta, at allir teir stóru sáttmálarnir eru komnir til høldar. Tá er at siga, at onkrir teirra gingu út longu 1. oktober í 2019.

**Fimm semjur**
30. mai gjørdi Maskinmeistarafelagið saman við hinum báðum manningar-feløgunum semju við Føroya Reiðarafelag fyri manningarnar við fiskiskipunum. Samráðingarnar høvdu verið drúgvar, ikki bara orsakað av koronu, men eisini tí partarnir høvdu ilt við at semjast. Tískil kom semingsmaðurin upp í leikin 20. mai, og umsíðir eydnaðist so at fáa semju um ein tvey ára sáttmála frá 1. apríl í ár at rokna.

Við semjuni hava manningarfeløgini fingið ávísar ábøtur framdar í felagsreglunum.

Ein viðbót svarandi til hálva minstuløn fyri hvønn dagin skal latast, um mynstrað verður í tíðarskeiðnum 27. desember til og við 1.januar.

Eisini verður eitt hálvárligt endurgjald fyri arbeiðsklæði tryggjað teimum, sum sigla fast við skipum, ið ikki frammanundan hava skipan við ókeypis arbeiðsklæðum. Endurgjaldið er 1.250 krónur fyri hvørt hálvár.

Eisini eru mørkini fyri, nær manningarnar skulu taka lut í oljuútreiðslunum, hækkað. Har markið fyrr var 4,70 krónur liturin, er tað nú 4,90 krónur liturin, og har tað fyrr var 3,95 krónur liturin, er tað nú 4,10 krónur liturin.

Ein broyting er eisini gjørd viðvíkjandi avrokningum, tá kvotur hjá skipum í øðrum skipabólkum verða avroknaðar. Broytingin hevur við sær, at nú eru somu reglur galdandi, sama um fiskað verður av felagskvotu ella eginkvotu.

Reiðarírindaða eftirlønargjaldið hækkar við fimm krónum – úr 45 krónum upp í 50 krónur per mann per dag. Eisini er ein nýggj tryggingaráseting komin í sáttmálan, sum áleggur reiðarunum at tekna eina lívs- og brásjúkutrygging fyri manningarnar. Tryggingin skal í minsta lagi svara til eina lívstrygging upp á 500.000 krónur, eina brásjúkutrygging upp á 100.000 krónur og eina barnabrásjúkutrygging upp á 60.000 krónur.

6. juli var semja gjørd við Fíggjarmálaráðið um maskinmeistararnar í almennum størvum á landi, hjá Strandferðsluni, íroknað meistararnar umborð á nýggju Erlu Kongsdóttir, og maskinmeistararnar, sum sigla við Magnusi Heinason og Jákup Sverra hjá Havstovuni.

Her er talan um trý ára sáttmála galdandi frá 1. juli 2019, og í tíðarskeiðnum hækkar lønin við tilsamans 5,86 prosentum – 1. oktober 2019 við 2,56 prosentum, 1. januar 2021 við 2,05 prosentum og 1. oktober 2021 við 1,25 prosentum. Umframt hetta blivu vaktargjøldini dagførd, og ein nýggjur sáttmáli við tilhoyrandi lønartalvu gjørdur fyri skipini hjá Havstovuni.

8. juli kom sáttmálin við KAF (Kommunala Arbeiðsgevarafelagið) til høldar. Hesin sáttmálin umfatar maskinmeistararnar hjá SEV og IRF. Semjan er meinlík henni við Fíggjarmálaráðið – ein trý ára sáttmáli við einum samlaðum lønarkarmi upp á 5,86 prosent. Harumframt blivu tillagingar gjørdar í lønunum hjá vaktmeistarum.

Eftir summarferiuna, tann 31. August, skrivaðu Maskinmeistarafelagið og FAG (Føroya Arbeiðsgevarafelag) undir nýggjan sáttmála fyri maskinmeistararnar í privatum størvum á landi.

Her er talan um ein tvey ára sáttmála við tilsamans 3,3 prosent lønarhækkan. Gildistíðin er frá 1. september 2020 til 1. juni 2022. 1. September hækkaði lønin 2,05 prosent, og 1. Juni 2022 hækkar hon 1,25 prosent. Umframt aðrar tillagingar samdust partarnir um at dagføra vaktargjøldini og at hækka viðbótina við 50 krónum.

18. september kom semja í lag við Fíggjar-málaráðið um seravtaluna fyri maskin-meistararnar umborð á vaktarskipunum hjá Vørn. Avtalan er galdandi frá 1. september 2019 til 31. september 2022.

Maskinmeistararnir á vaktarskipunum eru tænastumenn og fylgja lønarhækkingunum hjá øðrum tænastumonnum. Seravtalan umfatar serlig viðurskifti hjá hesum maskinmeistarunum, og ávísar tillagingar eru gjørdar. Millum annað er vaktargjald 1 broytt til 26,94 krónur og vaktargjald 2 til 53,88 krónur.

**Grønlendsk træta**
Næsti sáttmálin í røðini nú er sáttmálin við Reiðarafelagið fyri Handilsskip, sum er galdandi til 1. mars í 2021.

Ein óloyst træta liggur tó eisini á láni at loysa. Tað er viðvíkjandi sáttmálanum við grønlendska Polar Seafood. Trætan snýr seg um tulkingarspurningar í sambandi við avrokning, og hittust partarnir í august mánað í Keypmannahavn í eini royndat finna eina loysn. Hóast framstig blivu gjørd, eydnaðist ikki at koma á mál. Partarnir avtalaðu tó at hittast aftur út á heystið, men eru hesir fundirnir útsettir tvær ferðir vegna farsóttina. Ístaðin hava partarnir hitst á netpallinum Teams nakrar ferðir, og er ein fundur avtalaður afturat áðrenn ársskiftið.

Sáttmálin við APK (Grønlands Erhverv) er ikki dagførdur síðani 2006, men útlit hava verið fyri, at hetta kundi gerast nú. Tó er tað arbeiðið steðgað upp orsakað av trætuni við Polar Seafood.

– Men eg eri sannførdur um, at so skjótt sum tann trætan er loyst, verða tær samráðingarnar tiknar uppaftur, segði Ólavur Gunnarsson, formaður í Maskin-meistarafelagnum, á aðalfundinum í mai.

Samanumtikið er formaðurin hampuliga væl nøgdur við sáttmálastøðuna í løtuni.
- Vit kundu ynskt okkum meira á summum økjum, tað vil so vera, men sum umstøðurnar hava verið og enn eru orsakað av koronufarsóttini, so er tað kortini væl arbeitt, at vit yvirhøvur eru komin inn undir land við sáttmálunum, sigur hann.

# FØÐINGARDAGAR
# Maskinmeistarafelagið



| Navn | Føðingardagur | Bygd/býur | Aldur |
|---|---|---|---|
| Hans Egon Jacobsen | 10/6-1950 | Strendur | 70 ár |
| Dánjal Jákup Højgaard | 25/6-1950 | Saltnes | 70 ár |
| Magnus við Streym | 18/7-1950 | Oyrarbakki | 70 ár |
| Joen Jacob á Fløtunum | 24/7-1950 | Lambi | 70 ár |
| Svenning Eysturdal | 18/8-1950 | Tórshavn | 70 ár |
| Árni Madsen | 21/8-1950 | Kvívík | 70 ár |
| Jákup Sørensen | 29/8-1950 | Hoyvík | 70 ár |
| Hjalmar Norðberg | 29/8-1950 | Stykkið | 70 ár |
| Jón T. Eliasen | 9/9-1950 | Tórshavn | 70 ár |
| John Tórur Sigurðson | 20/9-1950 | Runavík | 70 ár |
| Jóannes Hansen | 23/9-1950 | Oyndarfjørður | 70 ár |
| Helge Ludvig | 23/9-1950 | Fámjin | 70 ár |
| Hans Terji Hansen | 30/9-1950 | Søldarfjørður | 70 ár |
| Helgi Olsen | 6/6-1960 | Tórshavn | 60 ár |
| Mads Andreas Hansen | 1/8-1960 | Skopun | 60 ár |
| Jákup Jacobsen | 7/8-1960 | Klaksvík | 60 ár |
| Jofrid Hansen | 26/8-1960 | Miðvágur | 60 ár |
| Aksel Petersen | 19/9-1960 | Toftir | 60 ár |
| Sam Vang | 10/7-1970 | Hoyvík | 50 ár |
| Tummas Pauli Juul | 18/7-1970 | Tórshavn | 50 ár |
| Torkil Hansen | 11/8-1970 | Tórshavn | 50 ár |
| Bárður Poulsen | 13/8-1970 | Nólsoy | 50 ár |
| Allan Magnussen | 24/8-1970 | Saltangará | 50 ár |
| Egil Danielsen | 8/9-1970 | Nólsoy | 50 ár |
| Símun Pauli Jacobsen | 23/9-1970 | Glyvrar | 50 ár |
| Símun Kerá | 6/6-1980 | Argir | 40 ár |
| Svenning Hansen | 12/6-1980 | Fuglafjørður | 40 ár |
| Áslakur Nesá | 27/6-1980 | Tórshavn | 40 ár |
| Olaf Bogi Sivertsen | 8/7-1980 | Tórshavn | 40 ár |
| Tom Tómasson Hansen | 23/8-1980 | Tórshavn | 40 ár |
| Høgni R. V. Niclassen | 4/9-1980 | Nólsoy | 40 ár |
| Fríði Smith Hammer | 25/9-1980 | Saltangará | 40 ár |
| Bárður Jónson Eliasen | 25/9-1980 | Tórshavn | 40 ár |
| Oddmar Jacobsen | 6/8-1990 | Argir | 30 ár |
| John Høj Joensen | 28/8-1990 | Skáli | 30 ár |
| Jón M. Ellendersen | 28/8-1990 | Fámjin | 30 ár |
| Bárður Johnsson Heinesen | 19/9-1990 | Klaksvík | 30 ár |

# TÍÐINDI frá Maskinmeistarafelagnum

**11. mars 2020**
Samráðingarfundur við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

**11. mars 2020**
Fundur við hini manningarfeløgini um samráðingarnar við Føroya Reiðarafelag.

**17. mars 2020**
Videofundur á Teams við Reiðaríið fyri Handilskip um íkomnu Koronustøðuna.

**20. mars 2020**
Videofundur á Teams við hini manningarfeløgini um íkomnu Koronustøðuna.

**27. mars 2020**
Nevndarfundur á Teams. Á skrá vóru trý mál til støðutakan, umframt kunning um seks onnur viðurskifti.

**31. mars 2020**
Fundur við umboð fyri SEV á Sundsverkinum um ymisk viðurskifti.

**16. apríl 2020**
Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**17. apríl 2020**
Nevndarfundur á Teams. Fundurin snúði seg um íkomnu støðuna vísandi til niðurløgdu sáttmálasamráðingarnar.

**22. apríl 2020**
Fundur á Teams við hini manningar-feløgini um støðuna vivíkjandi sátt-málasamráðingunum við Føroya Reiðarafelag.

**23. apríl 2020**
Samráðingarfundur við Føroya Reiðarafelag.

**29. apríl 2020**
Nevndarfundur á Teams. Á skrá vóru trý mál til støðutakan, umframt kunning um seks onnur viðurskifti.

**5. mai 2020**
Fundur í Smæruni við maskinmeistarar á Sundsverkinum.

**7. mai 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

Nevndarfundur í P/F Fakfelag. Fundurin varð hildin í hølunum hjá S&K-felagnum.

**14. mai 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**18. mai 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**19. mai 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**20. mai 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**23. mai 2020**
Ársaðalfundur hjá felagnum. Fundurin varð hildin í Smæruni.

**25. mai 2020**
Hoyringsfundur við Fíggjarnevndina í Tinghúsinum.

**27. mai 2020**
Semingsroynd við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**28. mai 2020**
Semingsroynd við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**29. mai 2020**
Semingsroynd við Føroya Reiðarafelag á Hotel Føroyum.

**30. mai 2020**
Undirskriving av nýggjum sáttmála við Føroya Reiðarafelag í hølunum hjá Semingstovninum.

**4. juni 2020**
Sáttmálasamráðingar við KAF í hølunum hjá okkum.

Stýrisfundur í Trygdargrunninum.

**10. juni 2020**
Nevndarfundur á skrivstovuni. Á skrá vóru átta mál til støðutakan umframt kunning um trý onnur viðurskifti.

**10. juni 2020**
Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið í hølunum hjá okkum.

**16. juni 2020**
Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið í hølunum hjá okkum.

**19. juni 2020**
Fundur við nevndina hjá Føroya Kommunufelag um støðuna viðvíkjandi sáttmálasamráðingunum.

**22. juni 2020**
Fundur á teams við hini manningarfeløgini og aktørar í fiskuvinnuni.

**23. juni 2020**
Sáttmálasamráðingar við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í hølunum hjá okkum.

**26. juni 2020**
Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið í hølunum hjá okkum.

**30. juni 2020**
Sáttmálasamráðingar við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í hølunum hjá okkum.

**30. juni 2020**
Fundur um arbeiðsviðurskifti á Teistanum.

**1 juli 2020**
Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið í hølunum hjá okkum.

**6. juli 2020**
Sáttmálasamráðingar við Fíggjarmálaráðið í hølunum hjá okkum.

**6. juli 2020**
Undirskriving av nýggjum 3 ára sáttmála við Fíggjarmálaráði.

**8. juli 2020**
Sáttmálasamráðingar við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í hølunum hjá okkum.

**8. juli 2020**
Undirskriving av nýggjum 3 ára sáttmála við Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Staðsetingin var býráðsskrivstovan í Tórshavn.

**3. august 2020**
Samráðingar um sáttmálan við Polar Seafood. Samráðingarnar fóru fram í hølum hjá Gorrissen & Fiederspiel í Aksel Tower í Keypmannahavn.

**4. august 2020**
Samráðingar um sáttmálan við Polar Seafood. Samráðingarnar fóru fram í hølum hjá Gorrissen & Fiederspiel í Aksel Tower í Keypmannahavn.

**5. august 2020**
Samráðingar um sáttmálan við Polar Seafood. Samráðingarnar fóru fram í hølum hjá Gorrissen & Fiederspiel í Aksel Tower í Keypmannahavn.

**7. august 2020**
Fundur saman við hinum manningarfeløgunum og løgfrøðingi um viðurskifti við trolaranum, Niels Paula.

**10. august 2020**
Fundur um ymisk viðurskifti umborð á Teistanum.

**14. august 2020**
Nevndarfundur á skrivstovuni. Á skrá vóru trý mál til støðutakan umframt kunning um trý onnur viðurskifti.

**19. august 2020**
Fundur á Farstøðini við umboð fyri SSL um viðurskifti á Teistanum.

**21. august 2020**
Handan av sáttmálakrøvum við Føroya Arbeiðsgevarafelag. Handanin fór fram í Vinnuhúsinum.

**24. august 2020**
Fundur saman við hinum manningarfeløgunum og løgfrøðingi um viðurskifti við trolaranum Niels Paula.

**28. august 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya arbeiðsgevarafelag í Vinnuhúsinum.

**31. august 2020**
Sáttmálasamráðingar við Føroya arbeiðsgevarafelag í Vinnuhúsinum.

**31. august 2020**
Undirskriving av nýggjum 2 ára sáttmála við Føroya Arbeiðsgevarafelag.

**2. september 2020**
Fundur um tiltakið Sjóvinnuforum. Fundurin var í hølunum hjá Sjóvinnuráðnum.

**3. september 2020**
Fundur umborð á Teistanum um ymisk arbeiðsviðurskifti har.

**15. september 2020**
Samráðingarfundur við Fíggjarmálaráði um sáttmálan hjá okkara limum á Vørn. Fundurin varð hildin í Portugálinum í Tinganesi .

**18. september 2020**
Samráðingarfundur við Fíggjarmálaráðið um sáttmálan hjá okkara limum á Vørn. Fundurin varð hildin í Portugálinum í Tinganesi.

**18. september 2020**
Undirskriving av nýggjum sáttmála fyri limir okkara hjá Vørn.

**23. september 2020**
Fundur við umboð fyri SSL á Farstøðini.

**25. september 2020**
Nevndarfundur á skrivstovuni. Á skrá vóru fýra mál til støðutakan, umframt kunning um fýra onnur viðurskifti.




liv.fo

**Tað ræður um at kenna seg tryggan**

Í meira enn eina hálva øld hevur LÍV tryggjað føroyingar á landi og sjógvi. Kundin eigur LÍV, og tí verður vinningurin borin aftur við góðum tryggingum, lágum rakstrarkostnaði og munagóðum avkasti á pensjónsuppsparingini.